SANKTA JÓSEFS BARNAGARÐUR

Varðagøta 12 • FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 28 54 • Fax 31 69 90

## Námsfrøðingar

Ert tú áhugað/ur at verða partur av einum vælsjóðaðum, jaligum starvsfólkabólki?

***-So er tað tær vit hava tørv á.***

Okkum tørvar tveir námsfrøðingar 30-32 tímar um vikuna, frá **1. januar 2008**. Ella eftir avtalu.

Eisini hava vit tørv á einum námsfrøðingi til avloysarastarv, fyri námsfrøðing í farloyvi. Starvið er 32 tímar um vikuna frá **1. januar 2008, og fyribils í eitt ár**.
Sankta Jósefs barnagarður er ein sjálvsognarstovnur, ið hevur virkað í 76 ár. Í stovninum eru 17 starvsfólk. Av hesum seytjan, hava 8 námsfrøðiliga útbúgving. Barnatalið er 82, í aldrinum 3-7 ár.

**Vit vænta, at tú:**
- Ert fyrikomandi.
- Er íðin, nærlagdur og álítandi.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevnir.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum.
- Er jalig/ur, og vísir gleði og áhuga í arbeiðinum.
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin.

Størvini eru lønt sambært Føroya Pedagogfelag og KAF í lønarstiga 11-17.

***Ljóðar hetta áhugavert?***

So send okkum eina skrivliga umsókn, saman við prógvi og viðmælum innan 30. november til

Sankta Jósefs Barnagarð
Varðagøta 12
100 Tórshavn

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Louise Smets, leiðara tlf. 312854

---

Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir Stuðulspedagogum/hjálparum til tvey 5 og 6 ára gomul børn við serligum tørvi í Runavíkar kommunu, at byrja 01.12.07 ella skjótast gjørligt.

Arbeiðið hjá stuðlinum er í samstarvi við Sosialu deild og familjuna at stuðla børnunum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag. Arbeiðsstaðið er í heiminum hjá barninum.

Annað starvið er seinnapart millum 15-20 tímar um vikuna, meðan annað er 40 tímar og kann býtast í tvey størv.

Sosiala deild skipar fyri, at starvsfólkini fáa neyðuga ráðgeving.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður at senda Runavíkar kommunu í seinasta lagi 27.11.07.

Runavíkar kommuna
Sosiala deild

---

# Hús í Klaksvík
## á Kjalarvegi 45 til sølu



Húsini, ið eru fra 1968, eru í sera góðum standi, tey eru í 3 hæddum- samlað búvídd uml. 190 fermetrar. Grundøkið er 259 fermetrar. Húsini eru stoypt og klødd við timbur. Umvælingar eru gjørdar seinastu árini. Verða seld um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 255816 best aftaná kl. 16.30**

---

## Tørvar tær

vælgjørdan timburmann, ring so til

**J. T. D.-smíð**
**v/ Hera Thomsen, timburmeistari**
**Tlf. 219318/319318**

---

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.



# MÓTTØKA

**Vit eru flutt í nýggj hølí á Frúutrøð 4.**

Í tí sambandi hevði tað glett okkum at sæð viðskiftafólk, starvsfelagar, vinir og kenningar í nýggju hølunum
**fríggjadagin tann 16. november 2007**
**frá kl. 15-17.**

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

---

## Innbúgv selist bíliga

Innbúgv í sera góðum standi hjá ikki-roykjarum selist bíliga vegna flyting, t.d. reólskipan + vitrina í massivum avsýraðum eik, flatskíggi 42", leðursofa 2 x 3 brún, spísiborð hvítlútað, Beko kuldaskáp, klædnaskáp, sovisofa o.a.

Ring og hoyr nærri!

**Heidi, fartlf. 25 44 44**

---

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

---

**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00



Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA